## Herverk á kirkjugørðum



Herverk í kirkjugørðum er ein vaksandi trupulleiki í Danmark, og úrslitið kann væl gerast, at kirkjugarðar framyvir verða læstir. Í 2005 vóru 29 kirkjugarðar fyri herverki, ímeðan talið fyri 2007 var komið heilt upp á 45. Á teimum 45 kirkjugørðunum varð í gjøgnumsnitt ein gravsteinur oyðilagdur um dagin. Á Bispebjerg kirkjugarði hava mongu herverkstilburðirnir nú fingið avleiðingar, soeleiðis, at garðurin nú bert er opin ávísa tíð á degnum, vaktir eru á varðhaldi alt døgnið, umframt at videokamera eru sett upp ymsa staðni í garðinum. Umhugsað verður nú at gera tað sama á fleiri av hinum kirkjugørðum.

## Hermenn fremja morð í USA

Minst 121 amerikanskir hermenn, sum hava gjørt herðtænastu í Irak og Afghanistan hava framt morð í USA, eftir, at teir eru heimafturkomnir. Tað skrivar New York Times. Tey flestu offrini hava verið familjulimir ella góðir kenningar. Yngsta offrið var ein tvey ára gomul genta, ið var myrd av 20 ára gamla pápa sínum, sum júst var afturkomin úr Irak. Umframt morðini, eru eisini fleiri krígsveteranar, ið hava verið orsøk til ferðsluvanlukkur, eftir at hava koyrt fullir. Eingin viðmerking er komin úr amerikanksa verjumálaráðnum.




# Sjálvræði til Brússel

**Fylgja vit tilmælinum hjá Kaj Leo, avlevera vit alt okkara hart vunnað sjálvræði, ikki aftur til Danmark, men til Brússel, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður**

VAL 08
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Løgmaður tekur ikki undir við Kaj Leo Johannesen at lima Føroyar inn í ES gjøgnum Danmark*

Tilmælið hjá Kaj Leo Johannesen, formanni í Sambandsflokkinum, um at Føroyar gerast limir í ES gjøgnum Danmark, fellur heldur ikki í góða jørð hjá Javnaðarflokkinum. Tískil tekur eingin av hinum trimum stóru flokkunum undir við Kaj Leo í hesum máli.

- Tað er einki í tí, sum higartil er komið fram, ið bendir á, at Føroyar kunnu vænta sær eitt undantak í fiskivinnupolitikkinum. Júst fiskivinnupolitikkurin er eitt »sensitive area«, sum skal stýrast centralt, og tað er tann vegin rákið gongur, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður.

Hann vísir á, at tað er júst fiskivinnan, sum heldur Noregi frá at søkja um limaskap í ES, tí ES vil heldur enn fegið hava Noregi við í felagsskapin, tí landið kann bjóða felagsskapinum so ógvuliga nógv.

Tað er eisini sera óheppið, at Kaj Leo Johannesen nýtir júst Áland sum dømi, tí gamaní hevur Áland fingið undantøk í sambandi við heimstaðarrætt og sjóvinnu, men teir hava samstundis avreitt allan sín sjálvsavgerðarrætt, og hava tí als onga ávirkan av nøkrum slag. Teir hava ikki so frægt sum ein sess í ES-tinginum, sigur løgmaður.

Tískil verður avleiðingin av einum føroyskum ES-limaskapi gjøgnum Danmark sambært løgmanni, at vit mugu avlevera øll okkara hart vunnu sjálvsavgerðarrættindi frá okkum aftur, ikki til Keypmanahavn, men til Brússel.

### EFTA góð loysn

Gerast vit limir í ES, verða tað aðrir, ið fara at gera av, hvussu nógv vit kunnu fiska hjá okkum sjálvum. Vit missa alt okkara ræði á øllum okkara viðurskiftum, sigur Jóannes Eidesgaard.

Annars harmar tað løgmann, at Kaj Leo Johannesen samanber EFTA við fjórðu deild. Hesin felagsskapur er júst rætti felagsskapurin hjá okkum at fara uppí, ikki minst tí við limaskapi í EFTA tryggja vit Føroyum tey fýra frælsini, sum eru so týdningarmikil fyri okkum, serliga í hesum døgum.

Eg eri sannførdur um, at vit hava valt rørttu leiðina og rætta leistin. EFTA er langt frá at meta við fjórðu deild, og eg hevði heldur ikki rokna við, at lond sum Ísland og Noregi fóru upp í ein limaskap, sum var á fjórðudeildarstøði, sigur Jóannes Eidesgaard.

So samanum tikið metir løgmaður, at samstundis sum EFTA er rætta forumið hjá okkum, so verður talan um eitt risa afturstig, verða Føroyar limaðar inn í ES gjøgnum Danmark. Tá missa vit alt tað, vit gjøgnum áratíggju hava stríðst so harðliga fyri at hava vunnið.

# Hetland og Áland ræða

**Fær Kaj Leo Johannesen makt sum hann hevur akt, og limar Føroyar inn í ES gjøgnum Danmark, gerast Føroyar ein ævigur útjaðari, sigur Høgni Hoydal**

VAL 08
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Vit verða ein ævigur útjaðari, fylgja vit Kaj Leo Johannesen í hesum máli, sigur Høgni Hoydal*

- Tað er rætt, at ES er eitt lítið viðgjørt evni, men eg haldi tað er ótrúligt, at mann kann tosa um at fara upp í ES gjøgnum Danmark, tí tað hevði gjørt okkum til eitt nýtt Hetland, sigur Høgni Hoydal um úttalilsini hjá Kaj Leo Johannesen í valsendingini hjá Kringvarpinum fríggjakvøldið.

Høgni Hoydal vísir á, at Hetland er ein útjaðari, ikki bara í Bretlandi, men í øllum Europa.

- Eitt annað ræðandi dømi er Áland. Álendingar siga, at tað ringasta, sum er hent landinum, er, at teir eru farnir upp í ES gjøgnum Finland, tí var vegurin út í Europa langur framman undan, so er hann uppaftur longri nú, tá alt skal ígjøgnum Finland fyrst, sigur Høgni Hoydal.

Hann sigur eisini, at tað er beinleiðis fupp, tá Kaj Leo førir fram, at vit kunnu fáa undantøk fyri fiskivinnuni.

- Tað einasta, sum hendir, er, at vit missa ræði á okkara tilfeingi, tað veri seg olja ella fiskur, sigur Høgni Hoydal.

Hinvegin vísir hann á, at vit sum sjálvstøðug tjóð beinanvegin kundu fingið limaskap í EFTA við teimum fýra frælsunum, ið jú er tað, sum Sambandið ynskir.

### EBS loysnin

- ES loyvir ikki, at tað verða skaptar nýggjar tjóðir innan fyri felagsskapin, og tí merkir ein innliman í ES gjøgnum Danmark, at Føroyar verða dømdar til at verða ein útjaðari, sum bara kann liva av olmussu í allar ævir. Tí skulu vit gloyma allar tankar um at gerast ein sjálvstøðug tjóð, fara vit inn í ES á henda hátt, sigur Høgni Hoydal.

Eins og formenninir í Javnaðarflokkinum og Fólkaflokkinum mælir Høgni Hoydal til, at Føroyar royna at sleppa sær upp í EFTA-samstarvið og harígjøgnum fáa atgongd til EBS-avtaluna.

- EBS gevur okkum allar fyrimunir og beinir av vegnum allar tær forðingar, sum vit í dag hava at stríðast við, sigur Høgni Hoydal.

Hann mælir eisini til, at vit í enn størri mun ganga saman í eitt samstarv í Norðuratlantshavi, tí í felag umsita vit eitt hitt største náttúruríkidømi í heiminum. Og tað hevur ómetaliga stóran týdning, at vit sjálvi hava ræði á øllum okkara tilfeingi, bæði tað livandi – fiskurin – og tað deyða, sum er oljan.

- Ikki fyrr enn Føroyar eru ein sjálvstøðug tjóð, kunnu vit byrja at tosa um limaskap í ES. Fylgja vit tilmælinum hjá Sambandsflokkinum, enda vit sum eitt annað Hetland ella Áland, sigur Høgni Hoydal.